Landssjúkrahúsið

Skurðviðgerð fyri nalva– og sárbrokk

Um brokk

Av ymiskum orsøkum kann koma eitt veikt umráði í búkveggin, sum so líðandi kann blíva til eina úttamban av búkhinnuni gjøgnum búkveggin. Hetta kallast eitt brokk

Eitt brokk er ein posi av búkhinnu, sum eisini kann fevna um ein part av tarminum. Brokk í búkinum kallast búkveggsbrokk. Búkveggsbrok kann deilast upp í nalvabrokk, sárbrokk og lærkrikubrokk.

Nalvabrokk

Orsøkin til nalvabrokk er, at ein partur av búkhinnuni stingur seg út gjøgnum ein opning í búkvøddunum við nalvan. Nalvabrokk kemur oftast fyri hjá smábørnum, men kann eisini koma fyri hjá vaksnum.

Sárbrokk

Aftaná skurðviðgerð kann sárbrokkur vera ein avleiðing hjá umleið 5-10% av sjúklingunum. Sárbrokkið kemur vanliga av einum skeivleika í arrinum, ella tí bruni er komið í og sárið harvið ikki er lekt ordiliga. Fólk ið hosta, viga ov nógv ella viga ov lítið, hava øktan títtleika fyri at fáa sárbrokk.

Eyðkenni fyri brokk

Í summum førum gevur brokk lítlan ella ongan ampa, burtursæð frá tí kosmetiska. Tó uppliva fleiri stikni og pínu, serliga tá tey hosta ella arbeiða hart.

Skurðviðgerð fyri brokk

Aloftast ber til at trýsta tey lítlu brokkini upp á pláss, men sum frálíður vilja flestu brokk vaksa og kunnu ikki longur trýstast upp á pláss.

Vandin við einum brokki er, at eitt lítið petti av tarminum kann kroysta seg út gjøgnum brokkið og kan elva til tarmakast. Hetta er ein sjáldsom, men álvarsom støða og krevur akutta skurðviðgerð.

Brokk fer sum regul ikki burtur av sær sjálvum. Einasta munadygga viðgerð er tí ein skurðviðgerð, har brokkposin verður tikin burtur, og búkveggurin styrktur. Møguliga við einum neti.

Forkanning

Áðrenn skurðviðgerðina kemur tú til eina forkanning. Til forkanningina greiður tú serlæknanum frá um tín ampa, og serlæknin kannar teg. Í nøkrum førum er tað neyðugt at leggja aðrar kanningar afturat fyri at tryggja sær, at tú ikki bagir nakað annað.

Síðani greiður serlæknin tær frá hvørjir viðgerðarmøguleikar eru, og tit gera av um ein skurðviðgerð er best fyri teg. Kunnað verður um skurðviðgerð, tíðina aftaná skurðviðgerð og um møgulig hjáárin og fylgjur av skurðviðgerðini.

Væntanir

Málið við skurðviðgerðini er at taka brokkið burtur og ampan tú hevur av tí. Skurðviðgerðin hevur góð úrslit, vágin fyri at brokkið vendur aftir er bert fá prosent og vágin fyri fylgjum millum lítil og ongin.

Fyrireiking

Áðrenn skurðviðgerðina verður tú innkallaður til journalupptøku, har kunnað verður um fastu, doyving og møguliga pausu við blóðtynnandi heilivági. Eisini fært tú útflýggjað ein faldara um doyving, ið vit viðmæla, tú lesur áðrenn skurðviðgerðina. Er talan um barn, ið skal skurðviðgerðast, viðmæla vit, at tit sum foreldur lesa faldarin um børn og doyving. Hesir faldarir finnast eisini á www.ls.fo . Eisini ber til at finna tilfar ið kann vera við at fyrreika barnið betur til komandi viðgerðir á www.hcand.dk.

Bað

Viðmælt verður, at tú fer í bað kvøldið fyri skurðviðgerðina og vaskar tær væl runt um og í nalvanum (við vatpinni og sápu). Um nógv hár er á skurðstaðnum, skal hetta takast burtur. Hetta kanst tú eisini fáa hjálp til, tá tú møtir skurðviðgerðarmorgunin (má ikki gerast við rakiblaði).

Skurðviðgerðin

Skurðviðgerðin verður gjørd sum ein dagskurðviðgerð, og tú kanst vænta at sleppa heim seinni sama dag. Skurðviðgerðin tekur uml. 1 ½ tíma tá hon verður gjørd við kikara og 1 tíma við opnari skurðviðgerð.

Opin skurðviðgerð

Her verður lagt ein skurður við brokkið og innihaldið í brokkinum verður gjørt leyst og skumpa aftur í búkholuna. Síðan verður eitt net av kunststof (hjá vaksnum) seyma inn, hetta styrkir búkveggin har hann er veikastur.

Kikaraskurðviðgerð

Skurðviðgerðin gongur fyri seg gjøgnum trý smá hol í búkvegginum. Gjøgnum eitt lítið kamera, sum verður leitt inn gjøgnum búkveggin, kann brokkið skurðviðgerðast inni í búkholuni. Tá brokkið er funnið, verður brekið í búkvegginum latið aftur við einum tilgjørdum neti, ið verður fest innanfyri.

Til skurðviðgerðir fyri størri brokk kann vera neyðugt at leggja dren (eitt lítið plastikkrør) í sárið, hetta leiðir sárvætuna burtur fyrsta døgnið.

Lokaldoyving verður løgd í sárið, tá skurðviðgerðin endar. Húðin verður seymað við sjálvupploysiligum tráði, klipsi ella tráði, ið skal takast burtur seinni.

Aftaná skurðviðgerð

Aftaná skurðviðgerð tosar tú við serlæknan og sjúkrarøktarfrøðingin, sum kunna teg um víðari ætlan og hvørji fyrivarni skulu takast í tíðini aftaná skurðviðgerðina.

Tá tú er útskrivað/ur

Pína

Tú kanst vænta at hava lætta til miðal pínu aftaná skurðviðgerðina. Tú kanst taka vanligan pínustillandi heilivág ið kann keypast í handkeyp á apotekinum. Aftaná kikaraskurðviðgerð kanst tú vænta at hava pínu í høgru øksl fyrstu 1-2 samdøgnini. Hetta kemur av luftini, ið blívur blást inn í búkholuna.

Sár/plástur

Plástrið kann takast burtur dagin eftir skurðviðgerðina (aftaná 24 tímar), tær nýtist bert at koyra nýtt plástur á, um tað vætar frá sárinum. Tað er ikki gott fyri lekingina at dekka sárið til.

Bað

Aftaná 24 tímar kanst tú fara í brúsu. Svimjing og karbað er best at bíða við, til dagin eftir at penturnar eru tiknar.

Trot og misliting

Økið runt um skurðin kann ofta blíva hovið og mislitt fyrstu vikuna, hetta fer burtur av sær sjálvum.

Eta og drekka

Tú kanst eta og drekka vanligan mat.

Magi

Tú hevur møguliga tørv á opningsevni fyri at halda opnining linan. Hetta fæst í hondkeyp á apotekinum. Vit viðmæla eisini, at tú drekkur ríkiligt av vatni fyri at halda magan í gongd.

Rørsla aftaná skurðviðgerð

Til ber at vera vanliga kroppsliga virkin beint eftir skurðviðgerðina, tó so, at atlit verður tikið til pínu.

Avmarking

Serlæknin vegleiður teg um, og í so fall hvussu leingi, tú skal halda teg burtur frá at lyfta ov tungt.

Sjúkramelding

Sum oftast kanst tú fara til arbeiðis aftaná 1 viku. Hevur tú hart kroppsligt arbeiði, so kanst tú vænta at verða sjúkrameldaður í 2-3 vikur. Hvat er galdandi í júst tínum føri, tosar tú við serlæknan um.

Burturtøka av klips ella pentum og uppfylgjan

Pentur ella klips skulu takast burtur hjá egnum lækna uml. 10-14 dagar aftaná skurðviðgerð. Um talan er um klips, fært tú eina tong heim við, til at taka klipsini burtur við. Um tú ert seymaður við sjálvupploysiligum tráði, skal onki gerast aftaná.

Tað er vanliga ikki neyðugt við nakrari uppfylgjan

Møguligar eftirfylgir

Blóðkýli og bruni í sárið

Hjá færri enn 5% kann koma ein blóðsamling ella bruni í sárið. Hetta kann hava við sær, at neyðugt er at opna sárið aftur og reinsa. Í hesum førum ber sum oftast til at seyma sárið aftur aftaná uml. 4 dagar.

Vætusamlan

Tað er vanligt, tá stórt net er sett inn, at ein vætusamlan kemur omaná netið í vikunum aftaná skurðviðgerðina. Vætan verður spakuliga upptikin, men í einstøkum førum kann verða neyðugt at súgva hesa út við eini nál.

Endurskapan av brokk

Við øllum sløgum av brokki er tað ein lítil møguleiki fyri, at brokkið kemur aftur. Í hesum førum er møguligt at fara undir skurð aftur.

Skaðar á onnur gøgn

Til ber at skaða onnur gøgn, serliga tunntarmin, undir skurðviðgerð. Hetta er sera sjáldsamt og aftaná útskrivan sæst hetta við, at tú verður illa fyri, fær tiltakandi pínu í búkholuna og fepur. Hendir hetta skalt tú innleggjast av nýggjum.

Vinarliga

Starvsfólkini á Skurðdeplinum